FRÁGREIÐING FRÁ ARBEIÐSBÓLKINUM AT VIÐGERA SPURNINGIN UM FRAMTÍÐARNÝTSLUNA AV ROYNDARSTØÐINI Í HOYVÍK.

Við skrivi dagfest 14. august 1981 setti landsstýrið undirritaðu í ein arbeiðsbólk at viðgera spurningin um framtíðarnýtsluna av Royndarstøðina í Hoyvík og Hoyvíksgarði, nú royndarstøðin skuldi flytast úr Hoyvík.

Av tí at tað dróg út við endaligu avgerðini um nær flytast kundi úr Hoyvík, fór arbeiðsbólkurin eftir avtalu við landsstýrið ikki í gongd við arbeiði sítt fyrr enn í mai mánað í ár.

Hugsanin um at byggja útisavn í Hoyvík kom fram í 1967 í sambandi við ætlanina um at flyta støðina úr Hoyvík.

Hetta endamál var eisini havt í huga, tá ið garðarnir í Hoyvík vórðu útskiftir við tað at allur bøurin í Hoyvík varð lagdur aftrat royndarstøðini, meðan festarin fekk endurgjald fyri at flyta niðan á Vatnaskørð.

Núverandi leiðslan á Fornminnissavninum er framvegis áhugað fyri at yvirtaka royndarstøðina sum eina heild. Á økinum er ein bóndagarður við úthúsum, geil og fornum bø, sum eigur at verða varðveittur. Í 1980 hevur Fornminnissavnið gjørt eina skráseting av bygningunum og møguleikunum fyri at nýta teir av Fornminnissavninum. Seinni ynskir savnið at kunna byggja nýggjar bygningar til framsýning og arbeiðshølir. Hesir bygningar eiga møguliga at plaserast har sum vakstrarhúsið nú liggur og eiga tí ikki at verða gjørdar nakrar ætlanir, sum forða hesum.

Mett verður hentast, at Fornminnissavnið kemur at umsita Hoyvíkina, t.v.s. eisini kemur at verða við, tá ið avtalur við aðrar um nýtslu av ávísum økjum skulu takast.

Undir viðgerðini hevur arbeiðsbólkurin fingið ymsar áheitanir um at fáa ymsar partar av Royndarstøðini til nýtslu, t.d.

1) skriv dagfest 27. apríl 1983 frá Lütje Lützen um loyvi at leiga royndarstøðina við bygningum v.m. til neytahald og møguligt grísahald.
2) Skriv dagfest 21. apríl 1983 frá Dánjal J. Danielsen, Tórshavn um at fáa royndarstøðina til leigu til húsdýrabrúk.

Framstil lagt í 2207 - /92.

3) Skriv frá Hanusi Wardum um loyvi til framvegis at hava rossabit í Langadali.
4) Áheitan frá Ovild Didriksen um at fáa okkurt øki til nøkur seyðafrælsi.
5) Áheitanir frá Janusi Mohr og Bjarna Hansen um leigu av økjum at velta í.
6) Harumframt ynskja tveir aðrir rossaeigarar, ið hava fyribils loyvi at hava ross síni á beiti í Hoyvík, at fáa hesi framlongd.

Til tær tvær fyrstu umsóknirnar um at leiga royndarstøðina við bygningum til húsdýrabrúk heldur arbeiðsbólkurin ikki tað bera til at játta hetta, men eigur bøurin at verða nýttur av landbúnaðinum.

Viðvíkjandi hinum umsóknunum (3-6) og øðrum um loyvi at hava ross og neyt á beiti, mælir nevndin til at roynt verður at sleppa undan at leiga økið til einstakar persónar.

Bøurin í Hoyvík er longu nógv skaddur av rossum og neytum, og stórdýr eiga als ikki at fáa loyvi at verða á bønum í Hoyvík.

Heldur eigur ein at lata Hoyvíksgarð fáa loyvi at nýta onnur økir enn sjálvan bøin til at sleppa seyð inn á áðrenn slátur og soleiðis at loyvir bert verða galdandi so leingi hetta hóskar inn í myndina hjá Fornminnissavninum.

7) Skógfriðingarnevndin hevur í skrivi 11. apríl 1983 sett ynski fram um at fáa vakstrarhúsið til nýtslu til framaling av runnum og trøðum. Sum er verður nógv av føroyskum plantutilfari sent til framalingar í drívhúsum í Noregi. Til hesa nýtslu nýtist eingin upphiting av húsunum, sum annars er ógvuliga óøkonomisk í nýtslu og treingja til stóra umvæling, um tey skulu nýtast til vanligan vakstrarhúsrakstur.

Eisini ynskir skógfriðingarnevndin eitt øki úti til framleiðslu av runnum og trøðum til víðari sølu, tí økið Oman Hoydalar er við at verða alt ov lítið. Til hetta endamál metir nevndin Langadal at vera sera hóskandi

8) Skriv frá Garðyrkisfelagnum um at royndarstøðin í Hoyvík heldur fram sum royndarbrúk innan garðyrkisvinnuna.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at garðyrkisvinnan eisini kemur undir royndarstøðina á Heygsgarði og tá vakstrarhúsið er í ringum standi og ógvuliga óøkonomiskt í oljuforbrúki, verður mælt til heldur at lata skógfriðingarnevndina fáa húsið til nýtslu inntil víðari, tí til endamálið hjá skógfriðingarnevndini er ikki neyðugt við nógvari hitanýtslu.

9) Nýtsla av stjóra- og uppisitarahúsunum til løgmanssetur.
Arbeiðsbólkurin ásannar, at her er ein møguleiki at fáa eini hús á hóskandi øki til ein løgmansbústað. Kostnaðurin av at seta húsini í stand til nevnda endamál verður størur helst yvir 1 mió. kr. Til bygningarnir møguliga verða nýttir til løgmanssetur, kunnu teir í núverandi líki við ávísum umvælingum nýtast sum arbeiðsbygningar hjá Fornminnissavninum. At innrætta ein part av húsunum til reseptiónslokalir hjá tí almenna, meðan Fornminnissavnið skal nýta restina, heldur arbeiðsbólkurin ikki vera nakra góða loysn.

10) Nýtslan av bønum.
Teir bøndur her um vegir, sum hava mjólkineyt, eiga at fáa høvi til at sláa bøin.
Nevndin hevur tosað við bøndurnar Hanus Wang, Óla Jákup Müller og Jógvan við Á. Teir hava áhuga fyri hesum og gjørt er eitt kort yvir hvat hvør skal sláa. Teir vilja binda seg til at sláa alt teirra tillutaða øki, soleiðis at einki stendur eftir ósligið.

11) Hagin.
Eftir sáttmála um útskifting av gørðunum í Hoyvík hevur festarin av Hoyvíksgarði rætt til at leiga hagan fyri eina leigu, sum partarnir kunnu semjast um, um royndarstøðin ikki longur ger brúk av haganum.

Vísandi til frammanfyri standandi setir nevndin fram fylgjandi

<u>t i l m æ l i</u>

1) Fornminnissavnið yvirtekur royndarstøðina alla innangarðs og hagan niðan fyri Hvítanesvegin sum eina heild og soleiðis at Fornminnissavnið kemur at umsita alla Hoyvíkina, t.v.s. eisini verða við um avtalur skulu gerast við aðrar um nýtslu av ávísum økjum.

2) Hagin verður leigaður festaranum av Hoyvíksgarði, sum hann hevur frammíhjárætt til eftir býtissáttmálanum.

3) Avtala verður gjørd við bóndurnar Hanus Wang, Óla Jákup Müller og Jógvan við Á, sum fáa bøin at sláa eftir fyriliggjandi korti.

4) Avtala verður gjørd við skógfriðingarnevndina, sum fær vakstrarhúsið fyribils og Langadal til nýtslu til framaling av runnum og trøðum.

5) Stjóra- og uppsitarahúsini verða reserverað til eitt komandi løgmanssetur. Til hetta verður aktuelt, nýtir Fornminnissavnið bygningarnar, uttan at gera innandura-umvælingar, sum forða hesi ætlan.

6) Økir verða ikki leigað einstaklingum at hava ross og neyt á.

7) Økið frá Boðanesgjógv niðan til Hoyvíksbø verður lagt sum fríøki.

8) Onnur økir kann Hoyvíksgarður fáa loyvi at sleppa seyð á áðrenn slátur.

9) Ísáðingarstøðin verður, til annað verður avtalað, umsitin frá bygningum á royndarstøðini.

Tórshavn, júli 1983

Kristian Joensen    Dánjal Larsen    Arne Thorsteinsson

Jalgrim Hilduberg